gult cyan magenta svart



# Havið skilur sundur og bindur saman



**– Føroyar og Bretland eru grannar. Havið millum okkum skilir ikki bert sundur, tað bindur eisini saman segði løgmaður til stóru móttøkuna í London og nevndi hann millum áhugamálini vit hava til felags, havumhvørvið. At tað ikki verður dálkað.**

ALMENN VITJAN
*Jan Müller úr London*

Eftir eina sera turbulenta vitjan í Skotlandi, har limosinin við løgmanni eitt skifti var innikavað við meturhøgum fannum eydnaðist tað tó løgmanni og fylgi at sleppa úr Edinburgh og til London.

Týskvøldið var móttøka á donsku sendistovuni í London, fyri umleið 100 innbodnum ur Bretlandi og Føroyum.

Her vóru nakrir av oddamonnunum í risastóru oljufeløgunum, sum síggja stórar møguleikar í føroysku undirgrundini, eitt nú BP. Til móttøkuna helt løgmaður eina rættiliga positiva og áhugaverda røðu, har hann eisini nam við viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Vit prenta røðu løgmans:

Fyrst vil eg takka danska sendiharranum fyri at halda hesa móttøku, nú bretska stjórnin hevur boðið mær higar til Bretlands sum gestur hjá bretsta uttanríkisráðnum.

Hesa innbjóðing fekk eg, tá ið eg saman við danska uttanríkisráðharranum bretska varauttanríkisráðharranum Tony Lloyd undirritaði sáttmálan um havmørkini millum Føroya og Bretlands 18. mai 99.

Hesin sáttmálin var ein fortreyt fyri, at føroyskir oljumyndugleikar kundu fara í holt við at fyrireika fyrsta føroyska útbjóðingarumfarið, ið varð lýst í februar í fjør og sum førdi til, at leitingarloyvi vóru latin oljufeløgum í august í fjør.

Semjan um markið læt eisini upp fyri einum breiðari samstarvi millum føroyingar og grannar okkara í Bretlandi, ikki minst í Skotlandi og serliga í Hetlandi og Orknoyum.



## Áhugi fyri samarbeiði

Eg og fylgi mítt hava nú ferðast í Skotlandi og hava har fingið váttað, at hugur er at samarbeiða á fleiri økjum.

Vit hava í nógv ár havt samskifti, kapping og samstarv á fiskivinnuøkinum. Bretsk skip hava í øldir fiskað undir Føroyum og føroysk skip hava seinastu 40 árini fiskað í bretskum sjógvi. Vit hava í nógv ár selt fisk til Bretlands, og eisini ein partur av okkara útflutningi til onnur europeisk lond fer um Bretland.

Nú oljuvinnan tekur seg fram, eru bretsk oljufeløg við í leitingini, og somuleiðis bretskar deildir hjá fremmandum oljufeløgum. Eisini tá ið talan er um veitingar til oljuvinnuna koma bretskar fyritøkur inn í myndina.

Vit vænta okkum nógv av hesum samstarvi og vóna, at tað fer at menna føroyska samfelagið og verða til gagns fyri allar partar.

Eisini ferðasambandið millum Føroya og Bretlands er í menning. Fleiri føroyingar søkja sær útbúgving í Bretlandi. Samhandil er nógvur millum Føroya og Bretlands. Nógv persónlig sambond eru millum fólk í Føroyum og í Bretlandi.

## Føroyar – Danmark

Føroyar hava í øldir verið í kongssambandi við Danmark. Føroyar hava síðan 1948 havt heimastýri (auitonomi). Hetta merkir, at føroyingar stýra sínum egnu viðurskiftum á fleiri og fleiri økjum, harundir tí vinnuliga og tí mentanarliga.

Sum tykkum kunnugt, hevur spurningurin um viðurskifti Føroya við danska ríkið verið eitt týdningarmikið evni í Føroyskum politikki í eini hundrað ár.

Tá ið hetta laqndsstýrið kom til eftir valið í 1998 varð ein høvuðsmálsetningur at virka fyri, at Føroyar gerast sjálvstøðugt land við fullveldi, skipað í tøttum samstarvi við Danmark – m.a. við kongsfelagsskapi og gjaldoyrafelagsskapi.

Við støði í hesum hevur Føroya landsstýri meginpartin av árinum 2000 samráðst við donsku stjórnina um ein tvívegis sáttmála, sum hevði til endamáls at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt ríki í frælsum felagsskapi (Free Association) við Danmark.

Tað eydnaðist ikki at røkka eina semju millum partarnar á hesum støði.

Tí hevur landsstýrið lagt sín politikk um til eina meira stigvísa ætlan, har landsstýrið innanfyri heimastýriskarmin vil fremja fyrisitingarligar og búskaparligar umleggingar. Tað merkir, at øll málsøki, ið ikki beinleiðis eru tengd at fullveldinum verða løgd undir føroyskan myndugleika eftir eini ætlan, sum røkkur fram til ár 2012.

Somuleiðis er ætlanin, at fíggjarligi stuðulin frá danska ríkinum verður minkaður til hann í seinasta lagi ár 2012 er fullkomiliga burtur.

Tá ið føroyska samfelagið eftir eina slíka gongd er vorðið mest møguliga fyrisitingarliga og búskaparliga sjálvbjargið (self-sustaining), eigur Føroya fólk at fáa høvi til á fólkaatkvøðu at taka støðu til, um tað ynskir fulla sjálvstøðu (independence).

## Gingið væl

Seinastu árini hevur gingist væl við føroyska búskapinum. Í hesum tíðum, har fólk gerast meira og meira varin við at keypa framleiðsluna frá nútímans landbúnaði, er helst ein fyrimunur at kunna bjóða teimum fisk úr heimsins reinasta sjógvi. Fiskaprísirnir hava verið okkum til vildar seinastu árini. Eisini hevur fiskaalingin støðugt vundið uppá seg.

Føroyingar hava mestsum bert sjógvin á at líta. Vit hava brúk fyri eini burðardyggari nýtslu av øllum tí livandi tilfeingirnum í havinum, antin tað er fiskur, sjófuglur ella havsúgdjór. Á millumlandastigi royna vit at virka fyri burðardyggari menning og reinum havumhvørvi.

## Havumhvørvið

Føroyar og Bretland eru grannar. Havið millum okkara skilir ikki bert sundur, tað bindur eisini saman. Millum áhugamálini, vit hava til felags er havumhvørvið. At tað ikki verður dálkað, hvørki frá ídnaði á landi, ella frá frálandsvirksemi.

Á sjónum millum londini kunnu óhapp henda, bæði við skipaferðslu og í frálandsvirksemi. tá er hent at hava hvønn annan at heita á til samvinnu um bjarging á sjónum og vernd móti havdálking.

Eg fari at enda við at siga, at vit eru fegin um at hitta øll tykkum og vóna, at vit fáa eina hugnaliga løtu saman um viðurskifti av felags áhuga.

## Fútaforboð

### Tíðindaskriv

Fútarætturin viðgjørdi í dag áheitan frá Fíggjarmálastýrinum um at seta fútabann móti blokaduni hjá Skipara- og Navigatørfelagnum, sum hevur lagt sjóbjargingina lamna.

Rætturin tók ikki støðu í málinum, men útsetti tað til komandi mánadag, so partarnir kunnu lata inn replikk og duplikk.

Landsstýrið metir blokaduna sum eitt álvarsligt sáttmálabrot, tí felagið hevur onga heimild at blokera størv, sum galdandi sáttmáli er fyri. Støðan er so mikið álvarsom, at Landsstýrið sær tað sum sína skyldu at fáa minsta krøvini til trygdina á sjónum í lagi aftur beinanvegin.

Fútarætturin er ein partur av vanligu rættarskipanini. Í Føroyum er eingin arbeiðsrættur, tí má vanliga rættarskipanin verða nýtt til tílík mál, og tað vil í hesum føri siga Fútarætturin.

Fíggjarmálastýrið bjóðaði annars Skipara- og Navigatørfelagnum at taka málið aftur í rættinum, soleiðis at teir vildu loyva, at menn skifta um vaktir, so Tjaldrið fæst í sigling. Hesum vildi felagið ikki ganga á møti.

Fíggjarmálastýrið vil enn einaferð royna at fáa Skipara- og Navigatørfelagið at gera eina semju um bólking av Brimli, og hevur tí boðið teimum til fundar í kvøld.

**13/2-2001**
**Karsten Hansen**



ÚT AT KOYRA

# Audi A4 – fluttur upp í hægri klassa

**Eftir at hava verið á marknaðinum í 6 ár, er Audi A4 nú komin í eini heilt nýggjari útgávu, ið er merktur av góðum kvaliteti á sera høgum støði. Bilurin minnir nógv um Audi A6, sum hevur verið brúktur sum fyrimynd.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Audi A4 er nú komin í eini heilt nýggjari útgávu, ið er merktur av góðum kvaliteti á sera høgum støði*
*Mynd: Jens K. Vang*

## Hørð kapping

Kappingin í Týsklandi er vorðin so hørð millum Audi í Ingolstadt, BMW í München og Mercedes-Benz í Stuttgart, at nýggi Audi A4 er fluttur ein klassa upp, fyri at fara í beinleiðis kapping við BMW 300-røðina og Mercedes C-klassan. Bilurin er bygdur yvir ein nýggjan plattform, sum eftir ætlan skal brúkast til tann næsta Passat´in, tá hann verður skiftur út um nøkur ár. Tað at bilurin er longdur sjey sentimetrar, og at aksulfrástøðan eisini er longd, ger at meira beinpláss er við baksetrini. Viðførisrúmið er stórt og væl innrættað.

## Lættur at koyra

Tann mest grundleggjandi broytingin við koyrieginleikunum er at bakaksilin og upphangið aftan eru óbundin av hvørjum øðrum (ikki fastur aksil). Tað fyrsta ein leggur til merkis er at bilurin stýrir sera neyvt og lætt, eins og koyrieginleikarnir eru fyrsta floks, og skjótt er at finna seg væl til rættis í bilinum.

At byrja við verða 5 motorar at velja ímillum: ein 2.0 litur við 130 hk, ein1.8T við 150 hk, og ein 3.0 litur V6 við 220 hk. Tveir turbodiesel motorar verða, har ein 1.9 TDI við 130 hk, og ein 2.5 TDI við 180 hk við Quattro og 6-trins gearkassa. Seinni verða fleiri aðrir motorar á skránni.



*Skjótt er at finna seg væl til rættis í bilinum*
*Mynd: Jens K. Vang*

## Tryggur bilur

A4 er sera væl útgjørdur og hevur nógva trygdarútgerð, sum eitt nú elektronisku stabilitetskipanina (ESP), elektronisku differentialesperruna (EDS), og antispinn (ARS) sum standard. Sum nakað nýtt hjá Audi, hevur A4 elektroniskan bremsuassistent, sum hjálpir bilføraranum við at hækka og fasthalda bremsutrýstið undir eini harðari uppbremsing, og harvið stytta um bremsulongdina. Umframt dupultan airbag framman og í síðunum, hevur A4 eisini airbaggardinur sum standard.

Automatiskt klimaanlegg er eisini standard.



*Bilurin minnir nógv um Audi A6, sum hevur verið brúktur sum fyrimynd*
*Mynd: Jens K. Vang*

Audi

### Audi A4 2.0

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur 4 syl. 131 hk |
| 0-100 km/t | 9,9 sek. |
| Bensinnýtsla | 12,3 - 12,7 km/l |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 454,7 cm |
| Breidd | 176,6 cm |
| Hædd | 142,8 cm |
| Eginvekt | 1310 kg |
| Totalvekt | 1860 kg |
| Viðførisrúm | 445 litrar |
| Prísur | 280.000,- kr. |
| Søluumboð | Bilasølan v/Øssur Johannesen<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tlf. 315354 |